## DAGSINS MEINING

# Lilla at liti

Mánadagin var so fíggjarlógaruppskotið 2003 lagt fyri pressuna av einum framúr vælnøgdum fíggjarmálaráðharra. Sjálvt uppskotið er áhugavert og ikki minni áhugavert er tann frágreiðing, ið fylgir við. Hóast sjálvt fíggjarlógaruppskotið við øllum viðmerkingum fyllur hálvtfimtahundrað síður, so tykist frágreiðingin uppá bert 30 síður minst líka áhugaverd sum sjálvt tað tjúkka fíggjarlógaruppskotið. Henda frágreiðing er í stóran mun eitt politiskt skjal, ið lýsir búskapargongdina frá 1988 til í dag, greiður frá innihaldinum í samgonguskjalinum og frá tí búskaparpolitikki, ið fer at verða rikin í 2003. Tað tykist skula prógva, at til fullveldissamgongan tók valdið, gekk alt av skriðuni, men so fingu vit Karsten, og alt varð sára gott. Kjarnan í smáritinum er, at landsstýrið miðar í móti einum árligum rakstraravlopi (nevnt RLÚ), ið alt, sum tað er, skal nýtast til at rinda avdráttir av lánum hetta fram til 2008. Við tað at blokkurin er minkaður við umleið 360 milliónum, verður alt avlopið 2003 nýtt til avdráttir. Um blokkurin ikki varð skorin, hevði avlopið ligið um hálva milliard. Vit lata lesaran sjálvan um at spekulera yvir, hvat henda upphædd hevði kunna verið nýtt til! Fíggjarmálaráðharrin upplýsir, at fíggjarlógaruppskotið inniheldur tvær høvuðsraðfestingar við øktum játtanum: eldraøkið og serforsorg (25 mill.) og útbúgving og gransking (6 mill.). Hertil kunnu játtast 20,5 mill. afturat, um hesar somu 20,5 milliónirnar samstundis verða spardar! Verður annars sæð burtur frá lógar-og sáttmálabundnum hækkingum og teimum báðum raðfestu økjunum er fíggjarlógin 2003 á útreiðslusíðuni óbroytt í mun til 2002.

Fíggjarlógaruppskotið er sum nevnt digurt verk stórt 450 blaðsíður, og perman er lilla at liti. Sambært litalfrøði kann liturin lilla vera ímyndin um dreymar. Hetta hava vit torført við sambinda við uppskotið hjá Karsteni. Her er lítið pláss fyri dreymum! Ikki tí: um raðfestingarnar er bert alt gott at siga, og tær mynda eitt ljóspunkt í lillalitta myrkrinum. Tær eru dámligar og sera hart tiltrongdar, men upphæddirnar eru so smáar, at tær gera at kalla hvørki frá ella til. Tað eru ikki nógvir framtíðardreymar í 25 milliónum til almannamálini og 6 milliónum til granskingina, soleiðis, sum hesi øki eru viðfarin seinastu 8 árini! Hvat hinum uppskotinum viðvíkur (um at játtaðar verða 20,5 milliónir meira, um sparast kunnu aðrar 20 milliónir), so má tað í hvussu so er vera dreymurin hjá einum hvørjum Molsbúgva, og man tí fara at gagna føroyingum tilsvarandi.

Kann verða, at lillalitta fíggjarlógin gerst marra hjá mongum. Andlitsliturin á formanni fólkaflokksins tóktist í hvussu so er at taka lit eftir permuni, tá hann sá skattalættan fara sama veg sum sigarroykurin! Meðan vit eru við litin, kunnu vit nevna, at litalfrøðin sigur, at lilla eisini kan ímynda vísdóm, ríkidømi, grammheit, girnd og allergi fyri pengum! Vit lata tað verða upp til lesararnar at umhugsa, hvørt hesi hugtøk hóska til lillalittu Karstensbók 2003, handað heimsins elsta parlamenti í gjár. Men vit fara komandi vikurnar so av og á at venda aftur til ta lillalittu og viðgera ávísar tættir av henni bæði í oddagreinum, viðmerkingum og í vanligum blaðgreinum.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Fíggjarlógin raðfestir vælferð, virðir og virksemi

**Kristina Háfoss**
*Framsøgufólk í fíggjarmálum fyri Tjóðveldisflokkin*



*Fíggjarlógaruppskotið fyri 2003 er nú almannakunngjørt. Fíggjarlógaruppskotið gevur eitt yvirskot á 150 mió. kr. - hetta hóast eina øking í rakstrarútreiðslunum á 182 mió. kr. og at íløgur verða gjørdar fyri heili 260 mió. kr.*

*Vælferðin verður raðfest høgt og eru tað serstakliga almanna- og heilsumál umframt útbúgvingar- og mentamál, ið fáa størri játtan. Somuleiðis er ætlanin at fremja skattalættar á góðar 50 mió. komandi ár.*

*Vælferð, virðir og virksemi fáa sostatt høga fíggjarliga raðfesting komandi ár - men neyðugt verður eisini at seta sparingar á dagsskrá.*

**Fíggjarlógin - eitt amboð at røkka málum**
Uttan visiónir og málrættaðar ætlanir kámast endamálið við býtinum av krónum og oyrum skjótt. Fíggjarlógin skal tí bert síggjast sum eitt amboð til at náa teimum málum, ið samgongan hevur sett sær. Hetta sæst eisini aftur í fíggjarlógaruppskotinum - í hvørtfall í ávísan mun.

Fyri at nevna nøkur dømi eru eitt nú ætlanir at fremja munandi ábøtur á eldra- og serforsorgarøkinum, ið fær økt játtan sína við 36 mió. kr. (rakstur og íløgur) - og somuleiðis eru áhugaverdar ætlanir á útbúgvingar- og granskingarøkinum, ið fær økt játtan sína við 23 mió. kr. (rakstur og íløgur).

Stórstu íløgurnar eru á samferðsluøkinum. Her eru tað serstakliga íløgurnar í nýggja Suðuroyarskipið og samferðsluhavnina á Tvøroyri, ið fáa hægstu raðfesting við heili 132 mió. kr. av samlaða íløgukarminum á 260 mió. kr.

**Skattalættar fyri framman**
Fyri at økja inntøkur landsins í framtíðini umvegis økt virksemi - heldur enn umvegis økt skattatrýst - er ætlanin at gera Føroyar til eitt alsamt meira skattavinarligt land og verða skattalættarnir komandi árini liður í hesi ætlan. Ár 2003 verður talan um góðar 50 mió. kr. í skattalættum og ár 2004 verður talan um somu upphædd - harvið íalt góðar 100 mió. kr. í skattalættum komandi tvey árini. Eisini eru fleiri onnur fíggjarpolitisk tiltøk á veg, ið verða til fyrimuns fyri føroyingar.

**Vøksturin í rakstrarútreiðslunum skal tálmast**
Núverandi fíggjarlógaruppskot inniber enn eina øking í netto rakstrarútreiðslum landsins á 182 mió. kr. í mun til fíggjarlógina fyri 2002 - harav góðar 50 mió. eru vøkstur í lógarbundnum útreiðslum. Tá hugsað verður um eykajáttanir og broytingaruppskot undir viðgerðini av fíggjarlógini v.m. kann vøksturin í rakstrarútreiðslunum væl enda við at gerast væl størri.

Havandi í huga, at skattalættin á 50 mió. ikki er innroknaður í fíggjarlógaruppskotið og at rakstarútreiðslurnar væl kunnu væntast at vaksa meira enn ætlað, er skjótt at yvirskotið á 150 mió. kr. tódnar - um neyðugu sparingarnar ikki verða framdar.

**Neyðugt við nýhugsan**
Við núverandi búskapargongd er greitt, at skal vælferðarsamfelagið Føroyar verða rikið við yvirskoti komandi árini er alneyðugt, at rakstrarútreiðslurnar ikki halda á við himmalferð síni. Tí verður neyðugt at fremja rationaliseringar og lógarbroytingar, ið bera við sær færri rakstrarútreiðslur komandi ár. Komið skal verða nærri inn á hetta í komandi greinum.

Tað er ongantíð ov skjótt at farið verður í holt við at fremja nýhugsan og nýskipan soleiðis, at grund verður løgd undir einum sjálvberandi føroyskum vælferðarsamfelagi.

**Viðmerking til greinina hjá Álvur Kirke. Sosialurin 24. september 2002**

# Hvat sigur danska grundlógin

**Nicloina Jensen Beder**
*Tórshavn 28. september 2002*



§ 70. Ingen kan på grund af sin trosbekendelse eller afstamning berøves adgang til den fulde nydelse af og politiske borgerlige rettigheder – **eller unddrage sig opfyldelse af nogen almindelig borgerpligt**.

Kirkjan er okkara upprunaliga grundstøði, bæði við andaligum og borgarligum skyldum. Eingin skuldi tessvegna kunna melda seg úr kirkjuni fyri at sleppa undan teimum borgarligu skyldunum, líka so lítið sum tað er gjørligt at sleppa undan kommunuskatti ella sjúkrakassa, við at flyta í annan trúarbólk. Er tað navnið kirkjuskattur, sum trúarbólkarnir hava ilt við at góðtaka, kunnu teir bara kalla tað borgaraskattur.

Higartil hevur kirkjan staðið sum ein eind undir somu leiðslu. Eg trúgvi neyvan, at tað borgarliga arbeiði, ið kirkjan hevur røktað, kann gerast betur ella bíligari.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:** Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Anja Weihe anja@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Rúnar Reistrup runar@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliassen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Páll H. Johannesen pall@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Finnur Justinussen finnur@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 4449520
tel. 225429
e-post: vilmund@sosialurin.fo

**Rullandi redaktionin:**
tel. 220507

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin

**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720

**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn

**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.




## VIÐMERKINGAR

# Aftursvar til Brynhild Thomsen

**John S. Myllhamar**



Góða Brynhild, takk fyri títt svar. Verjurøðuna fyri starvsfeløgunum í Útvarp Føroya, tími eg ikki at svara uppá. Hon er ikki annað enn tað, ið væntast kann av einum starvsfelag. Sum journalistur er tú í teirri hepnu støðu altíð at kunna bestilla tær atgongd til mikrofonirnar í Útvarpi- og Sjónvarpi Føroya, at lufta tínar meiningar um onnur menniskju og tíni áhugamál, og hinvegin eisini at vera spurd av teimum. Tann møguleika hava vit vanligu føroyingar ikki. So kunnu vit tosa so vakurt, í demokratiets hellige navn, um ytringsfríheit.

Brynhild, hvar í grein míni nevni eg orðið sjúka? Og hvar havi eg sagt, at tey samkyndu pr. automatik, verða lekt við at ganga í kirkju? Slutur. Bara sveimarar koma við slíkum pástandum, at øll verða lekt, sum trúgva »nóg mikið« á Guð. Eg segði, at samkynd koma eisini í kirkju, (tað eru tey nokk komin gjøgnum allar tíðir, og verða vælsignað saman við øllum okkum øðrum syndarum, ið har sita) men at tað ikki eru hesi, ið seta kirkjuni krøv, at hon skal laga lógir og boðan eftir teirra ynskjum og tørvi.

Sjúka - ja, eg veit ikki, hvussu vit definera hugtakið. Kynsliga at verða drigin at øðrum enn tí mótsatta kyninum stríðir í hvussu so er í mínum hugaheimi móti náttúruni. Nøkur menniskju vera eisini drigin at m. a. neytum, seyði, hundum, delfinum og gásarungum. Fyri mær ljóðar tað nokkso øvugt. Skal ikki koma inn á skapanarorningina, fyri ikki at vera tað ljóta orðið kristiligur. Vit løggeva kortini ikki fyri slíkum, men geva hesum menniskjum frið og somu rættindi at búgva í Føroyum, sum øll onnur - og tað fáa tey eisini.

Forrestin, tá ið tú tosar um sjúku, hví er tykkara framhalding tá, at tey pedofilu hava tørv á psykoterapi? Kann slíkt viðgerast?

Tú sigur teg hava sæð, ella hava prógv fyri, at føroyingar hava vanvirt og gjørt seg inn á tey samkyndu við hatursálopum og við at smildra rútar inn á tey. Samstundis skrivar tú, at tú fer ikki sita hendur í favn, men fer at stríðast sum úlvur á skóg fyri at verja hesi menniskju. Tað fær meg at spyrja: Hví meldaði tú so ikki hesi herverk til løgregluna? Tað hevði eg kent, sum mína kristnu skyldu, óansæð hvør taparin var, ið var útsettur fyri slík álop.

Brynhild, tú heldur fram við slagorðinum, sum gongur aftur ferð eftir ferð í kjakinum í Føroyum: fundamentalisma. Samstundis sum tú sigur teg verja allar bólkar í samfelagnum fyri happing, liggur diskrimineringin goymd í hesum: Fundamentalistarnir í Føroyum! Tú førir fram, at allir teir túsundtals vanligu føroyingar, sum vilja byggja á kristnu siðalæruna, sum hevur verið trúgv fedra okkara gjøgnum túsund ár, nú brádliga eru fundamentalistar tí teir ikki ganga inn fyri, at landið gerst eitt sekulariserað, eitt reint verðsligt samfelag. Hvør er tað, sum her happar, ja, meira enn tað? Er tað ikki Brynhild Thomsen? Við at rópa rakstrarróp út í flokkin: fundamentalistarnir!, sigur tú, at ein stórur skari av føroyingum eru kriminellir, eru voldsmenn, drápsmenn, yvirgangskroppar, sjálvmorðsbumbufólk eins og palestinensar og Al Quiata. Hava tínir friðaligu landsmenn slíkar skuldsetingar uppibornar?. Tað ið kennist so hugstoytt er, at tú sum journalistur og, sum eisini sigst vera sera fornuftig, veit hvat vit seta í samband við fundamentalismu. Øll, sum tit hava lært at rópa hetta herrópið, vita ikki, hvat tað er, tey siga. Ein maður segði ein dagin við meg, at eg var fundamentalist. Spurdi hann, hvat orðið merkir. Nei, tað visti hann ikki.

Veit væl, at í Føroyum eru víttgangandi átrúnabólkar, sum mangan bera seg býttisliga at, og at lítið høpi er í teirra útleggingum av skriftstøðum, eins og tað eisini eru skilaleysar og einkisigandi greinar, sum standa í bløðunum frá tínum viðhaldsfólki. (Les vavsturin »Samkynd og samlevnaður« av Sámal Matras Kristinasen) Men at skera allar føroyingar yvir ein kamb, sum vilja halda fast við, at lógir okkara eiga at byggjast á kristnu lívsvirðini, at teir eru fundamentalistar, er at fara ov vítt.

Tá ið tú, Brynhild, uttan konkret dømi, tosar um, at samkynd verða niðurgjørd, áspýtt og jagstrað úr landinum, so minnir hetta um tey, sum tráa eftir martýrtitlinum. Ein átrúnabókur, sum gjørdi um seg í Føroyum í sjeytiárunum, brúkti sama framferðarhátt. Hann kravdi at øll tey, sum høvdu sítt fasta gamla pláss í kristnum samkomuhúsum, skuldu frásiga sær sína sannføring, og laga seg eftir teirra amerikonsku mátum og meiningum. Vágaði onkur at siga teimum ímóti, fóru tey grátandi og rópandi um allar geilar: Vit eru stoytt út! og fingu sostatt onnur at taka synd í sær. Harvið eydnaðist teimum so at ogna sær útnevningina: Martýrar. Blaðmaður sær eisini út til at smíðja meðan jarnið er heitt, við fyri tíðina at koyra eina seriu í blaðnum. Hann hevur hiðartil verið í sambandi við tvey føroysk »offur« í Danmark, sum gera seg til martýrar, uttan at koma við nøkrum ítøkiligum dømum um jagstran og forfylging her heima, men bara við gitingum og við at lata undirlutakenslurnar koma til sjóndar.

Áhugavert hevði eisini verið at vita, um tey samkyndu, sum tú sigur eru jagstrað av landinum, flyta heimaftur, tá ið lógin um skrásett parlag verður sett í gildið í Føroyum?

At enda setur tú mær ein spurning, og skal eg svara tær soleiðis: Ein faðir, sum elskaði son sín, skrivaði honum arv til, ið skuldi verða hansara eftir deyða faðirsins. Pápin metti, at hetta var líka ómakaleyst, sum at teir báðir fóru á kommunuskrivstovuna at skráseta seg sum hjún/par.

Annars ynski eg tær, góða Brynhild, alt tað besta, har tú hevur títt yrki. Um tú metir meg, eitt vanligt kirkjufólk, at vera fundamentalist og alt tað ónda, sum tað inniber, so vil eg fyrigeva tær tað. Tú er nokk eitt hampafólk, sum bara hevur fingið eina ranghugmynd av landsmonnum tínum. Men ver púra rólig, eingin av hesum fremur nakra yvirgangsatgerð, hvørki móti tær ella teimum samkyndum. So trygt liva vit í gomlu kristnu Føroyum - enn.

Bæði tú og tey samkyndu, sum liva í útlegd, eru eisini hjartaliga vælkomin at flyta heimaftur, og at keypa tykkum grundøki og byggja tykkum heim tætt uppat mínum heimi, um tey eru til sølu. Eg fari ikki at ynskja ella jagstra tykkum burtur, sum onkur ger við tey evnaveiku í høvuðstaði okkara, haðani tínar 300 undirskriftir fyri tað mesta stava frá, hesin minniluti, ið ikki hevur nakran stuðulsbólk av demokratum, sekularisistum, og humanistum at verja seg.

# Fimleikafelagið Ljósið og Hoyvíkarhøllin

**Nevndin í Ljósinum**
*Helle Drews, Bára Skorá, Jonna Djurhuus, Randi Kúrberg, Ann Hansen*

Hetta er ein viðmerking til alla fjølmiðlaumrøðuna, felagið hevur fingið seinastu tíðina í samband við, at vit »eru sloppin inn« í Hoyvíkarhøllina. Hvør, ið hevur ábyrgdina av søguni, sum hon er komin fram og/ella viðgjørd í miðlunum, er okkum líkamikið, – men at músin er vorðin til elefant, er so heilt vist.

**Fýra tímar var alt**
Fýra tímar fríggjadag seinnapart, 15.00-19.00, var alt, talan kundi verða um. Ljósið hevur í mong ár gjørt vart við sínar hølistrupulleikar, savnað pening saman til høll, víst virkisfýsni og sam-starvsvilja við Tórshavnar Býráð um allar møguligar loysnir, men tað er sum at sletta vatn á gás.

**Kor og virkisumrøður við Ljósinum**
Ljósið hevur í dag oman fyri 700 virknar limir, 90% børn í aldrinum 2-14 ár. Vit leiga 45 hallartímar um vikuna, men tørvurin er nógv størri. Vit royna veruliga sum frægast… Vit húsast í 5 ymsum støðum í býnum, og er hetta ein ótolandi støða á mangan hátt. Eitt er umsiting og ábyrgd av eini rúgvu av lyklum og nógv samskifti við áðurnevndu støð, ið øll hava sínar mannagongdir, sum vit sjálvandi virða, men lættliga kundu ørkymlast av, tí eitt sum geldur her, er øðrvísi har. Annað er, at vit skulu gera fimmfaldaðar íløgur av øllum møguligum av tí sama, t.d. musikkanlegg, læknataskur, smáamboð /lutir til spøl og íðkan. Men tað ringasta, also mest forargiliga er, at tað er so torført at varðveita yvirlitið, tá tímatalvan fyri veturin skal leggjast. Hædd skal eitt nú takast fyri, at leiðarin nær úr Eysturskúl-anum, har hann sjálvur ger fimleik, yvir í Kommunuskúlan til ásettu tíð. Samstundis er tað rættiliga týdningarmikið, at tímarnir í Kommunuskúanum og Nonnuskúlanum heldur ikki fella saman, hvat liðaldursbólkinum viðvíkur, tí summi gera bæði amboðs- og rútmiskan fimleik. Sostatt skulu tímarnir helst liggja í forleingilsi hvør av øðrum, men halt endiliga ikki, at tað snildasta er at vera í sama stað, – tvs. antin í Nonnuskúlanum ella Kommunuskúlanum! Tað eru nevniliga ikki umstøður til amboðsfimleik í Nonnuskúlanum. Og at brúka ein tíma í Kommunuskúlanum til rútmiskan fimleik er oyðsl vegna tvørrandi kapasitet, so íðkararnir mugu renna í millum.

Enn er lættari, at fólk flyta seg enn at sunda amboðini staðanna millum, og tað er eisini í lagi, at soleiðis er eina tíð, um bert útlit eru fyri onkrum frægari.

**Framtíðin, Hoyvíkarhøllin – hvør er meiningin við Ljósinum?**
»Alt er søtt hjá tí svanga!« Og Ljósið er gorhungrað, tá húsarúmd umræður. Tað skal endiliga ikki misskiljast sum, at vit eru ikki glað fyri tímarnar í Hoyvíkarhøllini, men, men… Gev líka klokkutíðini og degnum gætur. Hatta eru vraktímar, vit hava fingið! Høvdu vit fingið tveir tímar fríggjadag og tveir onkran annan dag í vikuni, skuldu vit tagt, men ístaðin fyri eitt plástur á sárið, er tað sum salt verður roðað í, og vit fáa ikki annað enn gramt okkum.

Hvussu verður raðfest? Hvussu koma fólk fram til, at skynsamligasta venjingartíð fyri eitt felag, har flestu limir eru yngri enn 14 ár, er fríggjadag seinnapart? Tá eru øll móð og troytt, og familjan vil vera saman. Flestu eldru limir felagsins, sum annars kundu notið gott av góða hallarplássinum, arbeiða júst fríggjadag.

Hvat verður dentur lagdur á? Hevur støddin á felagnum einki at siga? Hevur tað heldur einki at siga, at vit eftirhondini gjarna vilja gjalda til okkara egna? Eisini í felagsskapi við onnur, um tað er loysnin! Og alt tað sum fimleikurin gevur, bæði likamliga, sálarliga og samfelagsliga! Er tað eingin, sum hirðir at virðismeta tað eitt sindur? Enn nokta vit at trúgva, at tað er ramasti álvarin, og vóna vit, at tey finnast, ið virða stóra arbeiðið, sum okkara leiðarar trúliga gera hvønn vetur. At vilji er onkustaðni at tryggja okkum liviligar umstøður.

Við fimleikakvøðu og vón um at verða tikin í álvara, sjálvt um vit umboða bleytu virðini og okkara limir »bara« eru børn og ung.

P. S.: Okkara limir verða einaferð vaksnir og tjena pengar.